## Konsertferð

Tórshavnar Klavertrio er í hesum døgum á konsertferð við tónleiki, sum hevur tilknýti til Ungverjaland. Fyrsta konsertin var á Toftum seinasta fríggjakvøld, og mikukvøldið 21. mars kl. 19.30 spælir trioin í Sandavágs kirkju. Seinasta konsertin verður í Læraraskúlahøllini hóskvøldið kl. 19.30. Í trioini eru Jóhannes Andreasen, klaver, Sámal Petersen á fiól og Tóri Restorff Jacobsen á sello. Skráin umfatar Haydn, Kodaly og Brahms.

## Fleiri flogferðir

Atlantsflog fer at gera nakrar eyka flogferðir millum Føroyar og Billund um páskirnar. Felagið sigur, at nógvir danir velja at halda páskafrí í Føroyum, samstundis sum nógvir føroyingar í Danmark vilja sleppa heim at halda páskir. Tí verða tríggjar eyka ferðir millum Billund og Vágar. Atlantsflog ætlar at økja flúgvingina upp á Billund og roknar við at flyta 30.000 ferðafólk á leiðini millum Vágar og Billund í ár, sigur sølustjórin Steffen Riskær.

# Ungir vinnuspírar vilja forkela føroyskar gómar

**Hetta skal vera tað reina luksus fyri sámuligan prís, siga ungfólk á Handilsskúlanum í Havn, sum ætla at forkela føroyskar gómar**

VØRUMENNING
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo




*Tveir ungir vinnuspírar, Bjartur Vestergaard Hjaltalin, vm og Jákup Berg, sum ganga á handilsskúla í Havn, eru spentir upp á luksus ísin, sum kemur á marknaðin í morgin*

- Vit hava smakkað okkum fram í langa tíð og nú halda vit, at vit hava sligið seymin á høvdið.

Jákup Berg er næmingur á handilsskúlanum í Havn og har hava tey arbeitt við eini verkætlan, sum tey eru rættiliga spent upp á.

Og í morgin sleppa vit so at royna úrslitið av arbeiðnum, sum Jákup og fleiri onnur ungfólk á Handilsskúlanum í Havn hava stríðst við í langa tíð.

Føroya Handilsskúli hevur eina verkætlan, sum tey nevna Ungt Virki, har næmingarnir skulu gera eitt virki og gera onkra vøru.

Eitt úrslit av hesum er unga virkið, Bravo, og tey hava ment ein nýtt slag av ísi, sum nu verður at fáa til keyps í føroyskum handlum.

Tey eru fýra dreingir í Bravo og teir eru Jákup Berg, Bjartur Vestergaard Hjaltalin, Hjørtur Kárason Justinussen og Hallur Djurhuus.

Hóast úrvalið av ísi í frystidiskunum kring landið er bæði stórt og fjølbroytt, halda hesir fýra vinnuspírarnir, at okkurt manglar og tað er ein rættur luksusísur.

- Tí hava vit ment ein ordiligan luksusís úr allarbestu rávørum. Vit hava brúkt róma frá MBM ístaðin fyri pulvur, sum allarflestu ísar eru gjørdir úr og vit hava bara brúkt fyrsta floks sukurlátu og har eru ongi kemis litevni ella smakkievni í.

Úrslitið er ein kaffiísur, sum vit halda er í serflokki, sigur Jákup Berg úr Bravo.

Ísurin eitur Dolce, sum merkir søtt og annað leskiligt á italskum. Samstundis eru italskur ísur tiltikin til dygd.

### Luksus fyri sámuligan prís

Men hóast talan er um ein luksusís, er prísurin sámuligur. Hann verður seldur í eskjum upp á 700 ml og ein slík eskja kostar 34,95 krónur.

- Fyribils hava vit gjørt sløk 500 kilo av ísi og framleiðslan er í bakarínum hjá Grón.

Men tað hevur verið ein langur vegur, til tey eru komin so langt.

- Vit hava selt breyð og jólatrø fyri at fáa fígging til verkætlanina. Einasti stuðul, vit hava fingið, er 2000 krónur, sum vit hava fingið frá Eik.

- Ístaðin fyri at biðja um fíggjarligan stuðul til verkætlanina, vildu vit heldur sjálvi vinna pening fyri at útvega neyðugu fíggingina.

- Samstundis hava vit smakkað og roynt okkum fram til vit funnu heilt rætta smakkin.

Fyrstu ferð, ísurin verður til sølu, verður á sølustevnu í SMS í morgin, fríggjadagin og leygardagin, har bólkarnir, sum eru við í Ungu Virki, vísa tað fram, tey hava at bjóða.

- Annars hava vit bara fingið tær allarbestu afturmeldingar frá teimum, sum hava roynt ísin og tí ætla vit at fáa hann seldan í handlum kring landið, sigur Jákup Berg.

Á sølframsýningini í SMS verður eisini annað áhugavert, eitt nú myndir úr, eitt serligt slag av juice, rabarbusúpan, grýtuundirløg og annað.

Men tað eru eisini bólkar av Kambsdali, úr Klaksvík og ein bólkur úr Finlandi, sum eisini hava sínar vørur, sigur ungi vinnuspírin úr Bravo.

# Nú ræður um at fara ígongd

**Nýggi formaðurin í landsstýrismálanevndini ætlar ikki at gera, sum Tórbjørn Jacobsen vil hava hann at gera**

SKÚLADEPIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Vit eiga at fegnast um, at tað nú loksins er klárt at fara undir skúlabyggingina í Hovi. Vit eiga eisini at fegnast um, at fleiri fyritøkur í Suðuroy skulu vera við í byggingina so eg veit ikki, hví summi vilja taka arbeiðið frá teimum og heldur lata útlendingar fáa tað, sigur Kjartan Joensen, formaður í landssstýrismálanevndini*

- Málið um skúladepilin í Hovi er avgreitt og nú ræður um at fara ígongd.

Kjartan Joensen, løgtingsmaður, er formaður í Landsstýrismálanevndini, sum hevur eftirlitið við landsstýrinum.

Í farnu viku samtykti Løgtingið at játta 14 milliónir afturat til at byggja skúladepilin fyri, so at kostnaðurin verður 74 milliónir í staðin fyri tær 60 milliónirnar, sum byggingin upprunaliga varð mett at kosta.

Andstøðan í Løgtinginum við Tjóðveldisflokkinum á odda, var so misnøgd við framferðina í málinum, at Tórbjørn Jacobsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, skeyt upp, at landsstýrismálanevndin tók málið upp til kanningar.

### Nú er at fara ígongd

Men tað ætlar nevndin ikki at gera.

Kjartan Joensen, sum kort síðani hevur tikið við sum formaður í nevndini, eftir at Kári P. Højgaard segði seg frá, ger greitt, at hann ger ikki meiri við málið.

- Hjá mær er hetta málið liðugt og nú ræður bara um at fáa skúlan bygdan sum skjótast, sigur hann.

Nývaldi formaðurin í landsstýrismálanevndini sigur, at tað tænir ongum endamálið at seinka hesum málinum enn meiri.

- Skal málið bjóðast út av nýggjum, gongur aftur tað mesta av einum ári, til byggingin kann fara ígongd. Og tað munnu vera fá, sum høvdu verið fegin, verður málið seinkað enn meiri, sigur hann.

Men nú sigur Tjóðveldisflokkurin, at eitt er, at áhugin at byggja skúlan fyri 60 milliónir er lítil. Men høvdu føroyskar fyritøkur vitað, at karmurin er 74 milliónir er tað ein heilt onnur søga, tí so høvdu fleiri fyritøkur verið áhugaðar at fingið arbeiðið og tí eigur skúlin at bjóðast út?

- Ja, tað halda summi. Onnur halda, at tað einasta, vit høvdu fingið burturúr hesum, er, at skúlin verður seinkaður enn meiri og at hann kanska enntá hevði verið enn dýrari.

Kjartan Joensen vísir á, at hetta seinasta árið er bara byggitilfarið dýrkað eini 20%.

- So tað er ikki ónatúrligt, at skúlin er dýrkaður 14 milliónir afturímóti metingini, upp á 60 milliónir, sum varð gjørd á sinni.

- Tí dugi eg illa at ímynda mær, at skúlin hevði verið bíligari, skuldu vit bíða tað mesta av einum ári afturat.

### Eiga at fegnast

Hann leggur afturat, at tað er ein politisk avgerð at flyta skúlan.

- Avgerðin er fallin og nú ræður um at fáa skúlan bygdan, so at suðuroyingar fáa ein nýggjan skúla.

Nú eru tað eisini handverksmeistarar, sum halda upp á, at skúlin skuldi verið útsettur, til tað var klárt at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya?

- Hvør veit, nær vit fáa útlendingar til Føroya, sum ikki skulu hava somu sømdir og somu lønir sum føroyskir handverkarar og føroysk arbeiðsfólk?, spyr Kjartan Joensen.

Hann vísir eisini á, at tað eru fleiri føroyskar fyritøkur, og eisini fyritøkur í Suðuroy, sum skulu vera við í byggingini sum undirveitarar.

- Og eg veit ikki, hví vit ikki skulu fegnast um tað, heldur enn at taka arbeiðið frá teimum og geva útlendingum tað, sigur formaðurin í Landsstýrismálanevndini.

- Eg haldi, at Suðuroyingar skulu fegnast um, at nú er klárt at fara undir at gera skúlan, leggur hann afturat.